# Sambandsmýtur ella føroyskt fólkaræði

DÁVID ISFELD
Hósvík



Fyrst av øllum, Johan Petersen; mær dámar ikki at vera lagdur undir søguavnoktan, søgufalsan og søgumanipulatión. Tað er ikki fullveldisfólk, ið syrgja fyri, at okkara børn og ungdómar einki læra í fólkaskúlunum um fólkaatkvøðuna í 1946, klaksvíksstríðið og jólafundin í 1888; tað líkist miðvísari søgufalsan og søguavnoktan.

**Mýta og veruleiki**

Tá tosað verður um fólkaatkvøðuna í 1946 koma persónligir og politiskir áhugar upp í tulkingina. Í øðrum londum, tá ein fólkaatkvøða verður tald upp, verða ógyldugar atkvøður ikki taldar við, tí tær hava onga ávirkan og eru tískil uttan týdning. Um vit telja upp eins og onnur demokratisk samfeløg, vildu vit fingið hetta úrslit: Loysing 50,7%, og stjórnaruppskoti 49,3% (166 atkvøður fleiri fyri loysing). Johan Petersen velur at taka tær ógyldugu atkvøðurnar við, fyri at loysingaratkvøðurnar skulu koma niður um 50%. Men hví skulu vit telja atkvøður øðrvísi enn restina av demokratisku londunum?

Johan Petersen sigur eisini, at fólkaatkvøðan bert var vegleiðandi. Danir hava á demokratiskan hátt valt sær eina grundlóg. Tað hava føroyingar enn ikki gjørt. Í donsku grundlógini er ein áseting um, at fólkaatkvøður eru at meta sum vegleiðandi. Tó er ongastaðni í donsku grundlógini ásett, hvussu farast skal fram, um antin føroyska ella grønlendska fólkið skal halda fólkaatkvøðu um sína tjóðarstøðu. Tað hevði eisini verið nógso nasadjarvt hjá einari tjóð at ásett í síni egnu grundlóg, hvussu aðrar tjóðir kunnu skipa sína tjóðarstøðu. Harafturat verður grundgevingin um, at 1946 fólkaatkvøðan einans skuldi verið vegleiðandi politiskt fullkomiliga tileinkisgjørd av avgerandi politiskum útsagnum bæði áðrenn og aftaná 14. september, og bæði av politiskum leiðarum í Føroyum og teirra samhugaðu í donsku stjórnini; millum hesar sjálvur forsætisráðharrin, Vilhelm Buhl. Hann boðaði undan fólkaatkvøðuni frá, at meirilutin av atkvøðugreiðsluni fór at verða virdur (kelda: tinganes.fo). Sig mær Johan, er útsøgn danska forsætisráðharrans ikki til at taka fyri fult? Koma forsætisráðharrar bert við óálítandi og vegleiðandi útsøgnum? Fólkaatkvøður verða fylgdar í øðrum siviliseraðum londum; men her í molbúgvararíki eru tær altso bert vegleiðandi? Álvaratos, er eingin endi á hesum býttisligu og konstrueraðu tulkingum? Antin hava vit fólkaræði, har fólksins rødd hevur týdning og fær fylgjur, ella eisini eru vit als ikki ein demokratisk tjóð. Hetta er enn eitt typiskt dømi, har sambandsvongurin spælur "demokrati" undir einum hjálandaveldi; tó bert inntil tað líkist ov nógv veruligum fólkaræði, tí tá koma vit ov nær loysingini.

»Lítla« valluttøkan í 1946 er enn ein kend og afturvendandi sambandsmýta. Valluttøkan í 1946 var 66,4 %, og var hetta faktiskt ein vanlig valluttøka í hesi tíð. Til samanberingar var valluttøkan á løgtingsvalinum í 1945: 75,7%, í 1946: 73,3%, í 1950: 61,3% og í 1954: 66,9%.

Tá ið danir atkvøddu fyri Maastricht-sáttmálanum var meirilutin eisini marginalur. Men danir eru demokratiskir, og skilja og virða rødd fólksins - í hvussu so er í egnum landi og uttan fyri ríkisfelagsskapin. Munurin á atkvøðunum var líka lítil sum í Føroyum í 1946. Valúrslitið hjá dønum um Maastricht var: Ja 49,3% og nei 50,7%. Hetta var virt og eftirlíkað. Tá fólkaatkvøða verður skrivað út, er tað álvara. Einki vigar meira í einum fólkaræði enn atkvøðan, røddin, hjá fólkinum.

Í forsetavalinum í USA um somu tíð var hetta valluttøkan: 1944: 56%, í 1948: 62,5%. Í nýggjari tíð í USA sær soleiðis út: 1980: 52,6%, í 1984: 53,1% (Reagan í báðum førum), í 1996: 49% (Clinton aðru ferð - historycentral.com) - og hetta er flaggberaratjóðin, eftir Bretland, tá talan er um fólkaræði og demokratiskar mannagongdir.

**Sannleikin um grundlógina**

Danska grundlógin kemur altíð upp at venda í slíkum kjaki. Fyri at tosa um hetta, má sannleikin fyrst staðfestast: Danir lýsti teirra grundlóg at vera galdandi í Føroyum í 1850, men føroyingar hava ongantíð atkvøtt fyri ella á annan hátt valt donsku grundlógina sum galdandi í Føroyum. Tá ið uppskotið til broytta danska grundlóg var til fólkaatkvøðu í 1953, var valluttøkan í Føroyum heilt niðri á 8,7 %. Aftan á valið varð henda grundlóg lýst at galda í Føroyum. Hvussu við hesum, Johan Petersen? Var tað ein nøktandi valluttøka, soleiðis, at úrslitið kundi gerast bindandi fyri Føroya fólk? Hetta er einfalt eitt hjálandaveldi, sum áleggur hjálandinum eina stýrisskipan. Trúgva vit upp á fólkaræðið og upp á rættin hjá Føroya fólki at taka avgerð um egnu lagnu sína, kunnu vit ikki annað enn halda fast við, at danska grundlógin er bert galdandi í Føroyum, um føroyingar loyva henni at galda. Vit kunnu, tá ið vit vilja, við fólkaatkvøðu annulera hesa grundlóg, til frama fyri okkara egnu. Tískil er einki høpi í, at nevna »brot á« ella »í stríð við« donsku grundlógina, tá føroyingar tosa um sjálvræði og loysing. Eingin lóg ella mynduleiki er hægri í Føroyum enn ynski og krav Føroya fólks.




# Gevi politikkarunum nógv hægri løn

JÚSTINUS LEIVSSON EIDESGAARD
justinus@olivant.fo



Sjálvstýrisflokkurin kom um vikuskiftið við fráboðan um, at inntøkumøguleikarnir hjá landspolitikarunum eiga at skerjast. Teir skulu eitt nú ikki hava dupulta bíðiløn.

Eg haldi. at vit skulu ganga øvugta leið. Politikkarar eiga at verða somikið væl løntir, at teir ikki eingang verða freistaðir til nakað annað starv. Tað eigur at vera ásett, at løgtingslimur kann ikki hava nakað annað starv, enn at verða lóggevari, somikið álvarsligt er hetta starv. Ein løgtingslimur eigur ikki at fáa nakra aðra løn enn ta, hann fær frá løgtinginum.

Eg hugsi, at løgtingsarbeiði er so mikið ábyrgdarfult og hevur so stóran týdning fyri trivnaði hjá hvørjum einstøkum borgara, at ein løgtingslimur eiga at fáa eins høga løn og okkara hægst løntu stjórar, vinnulívsmenn, okkara hægst løntu skiparar. Um teir vóru á hædd við okkara bankastjórar, er kanska heldur ikki við síðuna av, um ein hugsar um ábyrgd. Vit tosa um lønir í milliónaklassanum. Lønin skal verða somikið høg, at politikkarar ikki verða korrumperaðir av lokkandi fíggjarligum tilboðum av nøkrum slag. Tað skal verða bannað við lóg, at ein politikkarari kann hava nakra aðra inntøku, enn tað politiska arbeiðið gevur. Og pensiónin og yvirgangurin til vanligt borgarligt starv aftur skal verða somikið góð og trygg, at neyðugt er ikki at upptaka størv í ára tíggjur, tí ein er í farloyvi.

Onnur lond hava fyri langari tíð síðani funnið út av tí skilagóða í at løna politikkarum ordliga. Eitt nú Singapore. Har hevur tú ikki loyvi at hava nakra aðra inntøku, um tú er fólkavaldur. Hinvegin lønir landið tær somikið væl, at tú hevur ikki tørv á aðrari løn. Og harvið er møguleikin fyri korruptión minkaður niður í næstan einki. Afturfyri fær samfelagið politikkarar, sum kunnu halga arbeiðsorkuna til politikk, heldur enn at tað er eitt egostyrkjandi frítíðarítriv.

Um vit virða og løna tað politiska somikið, sum vit eiga, tá sleppa við frá ónøgdum sjúklingum, tá ið læknarnir Andrias Petersen, Jenis av Rana og Marjus Dam eru í roki í løgtinginum. Tað verður ikki neyðugt hjá Kára Post at verða fremsti maður í várróðrinum á Norðhavinum ella frammalaga í hummaraveiði, sum tað hevur verið neyðugt hjá honum fyrr og honum nýtist heldur ikki eitt starv at bíða eftir honum á Posta. Hann hevði føtt fornuftigari hugskot enn hetta seinasta, tí tá hevði hann havt stundir til at verið politikkari. Kári á Rógvi nýtist ikki at hava onnur størv fyri at samsýningin samsvarar til hansara juridisku útbúgving. Her eru nøkur nøvn nevnd, eg kundi havt nevnt fleiri. Kanska onkur politikkari gníggjar sær í lógvunum av nevndu dømum, kikarin vendir móti tykkara grammni eisini.

Og hinvegin høvdu vit tá fingið politikkarar, sum einki annað høvdu at hugsa um enn politikk. Fólkaheilsan í Eysturoynni, Havnini og Vágum hevði ikki ávirkað politiska arbeiðið. Heldur ikki gýtingin á Norðhavinum ella lokkandi juridisk bein í Suðurstreymi.

Og vit høvdu fingið betri politikkarar og harvið eitt betri samfelag til frama fyri øll.

Nøkur av okkara bestu politisku talentum koma ongantíð á ein uppstillingarlista av teirri einføldu orsøk, at tey hava ikki fíggjarliga ráð at fara upp í politikk, og tað er stórt spell fyri fólkaræðið. Og tíðin eigur at vera farin frá, at skúlalærarar pr. automatikk sita á tingi, tí ongin annar hevur stundir og ráð til at løggeva okkara landi.

Og høvdu politikkarar havt virðilig fíggjarlig kor, tá hevði eitt fullkomiliga óumhugsað uppskot, sum tað seinasta frá Sjálvstýrisflokkinum als ikki sæð dagsins ljós og nógv onnur við hesum. Vit høvdu fingið politikk heldur enn møsn.

*Hellurnar tann 23. februar*